# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Folk, funk og blues í Cleopatra

Cleopatra bjóðar aftur hetta vikuskiftið nógvan livandi tónleik. Her verður talan um góðsku tónleik innan folk, funk og blues komandi trý kvøldini.

Í kvøld hóskvøldið spæla Uni Reinert Debess og Búi Dam fólkatónleik. Hendan samanrenningin millum Go Go Blues mannin Una og fyrrverandi 200 og Ivory mannin Búa hevur fyrr givið nógvar góðar tónleikaupplivingar eitt nú í Headache Blues Treo. Men í kvøld er altso talan um fólkatónleik.

Fríggjakvøldið spæla trý ættarlið innan rútmiskan tónleik Benjamin Petersen, Brandur Jacobsen og Arnold Ludvig. Hesir fevna allir breitt í sínum tónlistarliga yrki, men fríggjakvøldið savnast teir um funk tónleik.

Leygarkvøldið spæla tveir triðingar av Go Go Blues, Uni Reinert Debess og Arnold Ludvig og tað tekur ivaleyst ongan av bóli, at teir leggja seg eftir Blues tónleiki.

**nud**

Árni í Stórustovu, Keypmannahavn:

## 25 ára starvsdag á Christiansborg



Fríggjadagin 17. mars millum kl. 10-12 verður móttøka á Christiansborg í sambandi við, at Árni í Stórustovu, parkeringsvørður, hevur 25 ára starvsdag.

Árni er 64 ára gamal og havnarmaður. Hann hevur í búð í Keypmannahavn síðan 1974.

Eftir at Árni varð liðugur við realskúlan, fór hann til Danmarkar á eftirskúla.

Í 1969 yvirtók hann "Kiosk Centrum" eftir at mamman, sum var donsk, var flutt til Danmarkar at búgva. Handilin var serliga var kendur fyri sítt heimagjørda góðgæti sum t.d. páskaregg og marcipanbreyð av ymiskum sløgum.

Í 1974 gavst Árni við Kiosk Centrum og flutti til Keypmannahavnar at búgva. Fyrstu árini gekk hann í skúla, har hann tók handilsskúlaprógv og fór seinni á hægri handilsskúla, Niels Brock. Eftir tað arbeiddi hann í timburhandli og á eini eykalutagoymslu, til hann í 1981 fekk starv sum parkeringavørður á Christiansborg, har hann dagliga ansar eftir umleið 300 bilum.

Árni er sonur Kims (1908-1992) og Jakke í Stórustovu (1905-1951) í Havn, sum fingu fýra synir: Kaj, sum doyði í 1946, 15 ára gamal, Viggo, Eyolf og Árni. Viggo og Eyolf eru báðir deyðir, so Árni er tann einasti, sum er eftir á lívi.

Árni er giftur Joslu, f. Henriksen, úr Sandavági. Tey eiga børnini: Ann, sum er 37 ára gomul og býr í Nyborg á Fyn, og Kaj, sum er 34 ára gamal og býr í Keypmannahavn. Abbabørnini eru 6 í tali.

Árni sigur, at honum dámar sera væl starvið. Hann kemur í prát við nógv ymisk fólk og umgongst dagliga kendar danskar politikarar.

Adressan hjá Árna er: Stationsvej 11, DK-4470, Svebølle, tel. +45 59293944

Fyri 30 árum síðan:

## Kyndil 20 ár í 1976

Fríggjadagin 10. mars 2006 fylti hondbóltsfelagið Kyndil í Havn 50 ár.

Felagið var stovnað 10. mars 1956 sum ein deild av Ungmannadeildini hjá NIOGT í Føroyum, har Jákup Lindeskov var formaður.

Í fyrstu nevndina í Kyndli komu: Jógvan A. Joensen, formaður, Hannis Jacobsen, næstformaður, Viggo í Stórustovu, skrivari, og Elsa Poulsen, kassameistari. Tiltakslimir vóru: Rannvá Hentze og Nikk Hansen. Pole Jacobsen og Tórbjørn Mikkelsen vóru fyrstu grannskoðararnir.



*Myndin er tikin í 1976, tá felagið fylti 20 ár. Tá var skipað fyri kapping millum old-boyslið Kyndli og Neistanum. Aftara rað f.v.: Ludvík Petersen † (dómari), Gunnar Ihlen (Neistin), Nick Hansen † (Kyndil), Petur Hans Poulsen (Kyndil), Pole Jacobsen † (Kyndil), Hannis Jacobsen (Kyndil), Heðin Mikkelsen (Kyndil), Jákup Dahl (Neistin), Vagnar Olsen † (Kyndil), Tórbjørn Mikkelsen (Kyndil) og Kriss Guttesen † (Neistin) Fremra rað f.v.: Jákup Lindenskov (Kyndil), Dia Jacobsen (Kyndil), Jógvan A. Joensen (Kyndil), Petur Clementsen (Neistin), Heri Jensen † (Neistin), Henning Eysturoy † (Neistin), Heini Johansen (Neistin) og Evald Larsen (Neistin)*

*Mynd: Myndaárbókin – árið ið fór 1976*




Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum